# Oddagrein

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



# LUFTBALLÓNIR OG ROKNIARKIÐ

Agurkutíðin er tiltikin fyri, at politiskar luftballónir verða blástar og sendar upp. Luftballónin er eyðkend av, at hon í eina løtu skínur so fagurliga. Hon ferðast skjótt, og hon verður eygleidd av mongum. Summar luftballónir bresta og verða til einkis, aðrar fara úr eygsjón, áðrenn tær skrædna og detta niður, og onkuntíð kemur tað fyri, at luftballónin yvirlivir og tænir einum endamáli.

Eisini føroyskir politikarar eru vorðnir óførir at blása lufballónir og at senda tær avstað. Ein tingmaður sendi fyrr í vikuni eina luftballón upp, sum lýsti við, at tingmenn skuldu fara niður í løn. Í dag hevur løgmaður blást sína luftballón: tingmannatalið skal lækka við tíggju!

Hetta eru fínar søgur at bera fram á torg, men spurningurin er, hvussu veruliga virðið er í teimum. Tað vita vit meira um, tá ið løgtingsmaðurin og starvsfelagarnir í heyst fara at sita við fíggjarlógaruppskotinum, og tá ið kommisiónin, sum er sett at viðgera spurningin um valskipanina, hevur avgreitt sín setning.

Um galdandi fasittlisti í øllum politiskum spurningum verður nýttur, so kann tað væl fara at vísa seg, at luftballónirnar hjá bæði tingmanni og løgmanni kunnu gerast til veruleika. Tí tá ið alt kemur til alt, so er tað rokniarkið og ikki nógv annað, sum



stýrir. Og stýringin sigur, at alt skal krimpast, og at einki skal vaksa.

Tingið hevur fyrstu ferð samtykt játtanarkarm, og í løtuni verður telvast um, hvussu býtið skal vera í fíggjarlógaruppskotinum. Telvingin er ikki vorðin léttari, eftir at karmurin er samtyktur, tí nú ber ikki til at gera politiskar raðfestingar, sum kunnu føra til, at karmurin hjá einum ráði og einum landsstýrismanni minkar, meðan hann kanska fer at vaksa hjá einum øðrum.

Landsstýrisfólkini kunnu við øðrum orðum bara blása luftballónir og senda tær upp innan sítt egna øki, og tað er torført. Rokniarkið ræður, og tí eru fyritreytirnar hjá luftballónunum uppaftur verri, enn tær annars eru í agurkutíðini. Uttan mun til hvussu fagurliga tær skína. Tí eru hyggiráðini hjá teimum, sum nú undan Ólavsøku ætla at blása og senda ballónir, at tær eru í tráð við rokniarkið. Annars hava tær ongan kjans.

**» Eisini føroyskir politikarar eru vorðnir óførir at blása lufballónir**

# Helena vil ikki hava reglugerð



Síðani føroyski stripparin Victoria Wild var á forsíðuni í Sosialinum fyri einari viku síðani hava fólk kjakast um, hvørt føroyski tjóðbúnin skal staðfestast sum tjóðarbúni og reglugerð gerast um, hvussu hann kann brúkast.

Osøkin var, at Victoria Wild hevði strippshow í føroyskum klæðum, og tað halda fleiri er ópassandi.

Helena Dam á Neystabø, sum er landsstýriskvinna í mentamálum, heldur ikki, at neyðugt er við eini reglugerð.

– Strippið í føroyskum klæðum var lættisoppakent og kommersielt, men eg eri av teirri fatan, at vit skulu hava so fáar reglur og forboð sum gjørligt, sigur Helena Dam á Neystabø.

– Sjálvandi skulu vit eisini hava virðing fyri føroyska búnanum, og hann skal avgjørt ikki enda sum fótatraðk, men eg rokni ikki við, at eitt einstakt dømi sum hetta hóttir búnan. Føroyski búnin er mótstøðuførur, og vanliga er stór respkt fyri honum, og hann tolir eisini eina slíka avbjóðing, sigur Helena Dam á Neystabø.

– Vit skulu ansa eftir, at vit ikki konservera føroyska tjóðarbúnan. Vit hava ein sera livandi tjóðarbúna, sum verður nógv brúktur, og soleiðis skal tað eisini verða frameftir. Gera vit eina reglugerð-um brúkið er vandi eisini fyri fundamentalismu og konservatismu, sigur hon.

*eydun@sosialurin.fo*



**» Ov nógv við 33 tinglimum**

KAJ LEO JOHANNESEN
SÍÐA 7



**» Ágangurin á Havnina er mangan øgiligur**

HEÐIN MORTENSEN
SUMMAR SÍÐA 10-11

# Sett ferð á eftir mateitran

Tað gongur við teirri rúkandi ferð hjá Livari Nysted og hinum trimum umborð á Artemis Investments, nú teir rógva tvørtur um Atlantshavið.

Í vikuni frættu vit, at teir hava havt trupulleikar við eitt sindur at mateitran umborð, men henda er nú vekk, og hava teir av álvara fingið ferð á bátin aftur. So mikið stór er ferðin, at teir í gjár megnaðu at sláa tað heimsmetið, teir herfyri settu við longsta teini, nakar hevur róð á opnum havi í eitt samdøgur.

Í gjár megnaðu teir at rógva heilar 190 kilometrar, sum er næstan tað dupulta av tí, teir skulu rógva um dagin,fyri at klára heimsmetið.

Hetta er bert gjørligt, tí teir høvdu ein fittan vind inn á reyvina, umleið 15 m/s og eitt sindur kraftigari í glæðunum. Men hetta ger samstundis sjógvin sera torføran at rógva í, siga teir frá. Aldurnar eru okkurt um 3 til 4 metur høgar, og tað gongur betri hjá teimum tá vindurin er minni. Men nakað av viðstreymi hava teir eisini.

Lagið umborð er, sum skilst gott. Teir hava lagt 3296 kilometrar afturum seg av tí tilsamans 5303 kiliometra langa teininum. Sostatt hava teir góðar 2000 kilometrar eftir á mál. Og við hesari ferðini fer tað at eydnast teimum væl áðrenn tey 55 samdøgurini, sum er 114 ára gamla metið í at rógva úr New York í USA til Falmouth í Suðuronglandi.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*